## Claus kom inn og tapti

Blackpool var á odda 1-0 í útidystinum ímóti Sheffield Wednesday leygardagin, tá ið fyrrverandi føroyski landsliðsspælarin Claus Bech Jørgensen kom á vøllin. Hetta var eftir ein tíma av dystinum. Fáar minuttir eftir, at Claus var komin inn, javnaði Sheffield Wednesday. Ein spælari rann frá Claus og einum liðfelaga og legði upp til málið. Ilt gjørdist verri, tá ið Sheffield Wednesday legði seg fram um 2-1 fimm minuttir seinni. Stórt vónbrot fyri Claus og liðfelagarnar, sum taptu dystin við hesum úrsliti.



## Lukasz stegðaði Fremad

Fyrrverandi VB-spælarin Lukasz Cieslewicz skoraði fyri 2. Lið hjá Brøndby, sum vikuskiftið spældi ímóti oddaliðnum í 2. deild eystur, Fremad Amager. Lukasz legði Brøndby á odda 1-0 í 18. minutti, og seinni í dystinum fekk hann eisini gult kort. Anders Jochumsen javnaði fyri Fremad Amager, tá ið tað restaðu stívliga fimm minuttir. Fremad Amager liggur á odda á deildini og er í løtuni seks stig frammanfyri næstu liðini.

B71-EB/S 1-4 (0-2):

# Nú smakkaði

*B71*

*EB/S*

**Hóast úrtøkan í landskappingini gjørdist neyvt tann sama, sum í fjør, so var lagið hjá EB/Streymi munandi betri leygardagin, enn tað var fyri einum ári síðani**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Við at vinna silvur annað árið á rað tykist EB/Streymur veruliga hava bitið seg fast í føroyska fótbóltsoddin*

*Mynd: Sofus D. Johannesen*

54 stig. Tað var tað, sum EB/Streymur fekk í stigaposan í ár. Hetta er tað sama, sum liðið vann sær í fjør, og eins og ta ferðina, so rakk tað eisini til silvur í ár.

Men í mun til næstan sorgarstøðuna á Mølini í fjør, so var lagið í hópinum heilt gott, nú talan aftur gjørdist um silvur.

- Hetta var nakað heilt annað. Í fjør høvdu vit jú allar møguleikar at ogna okkum gullið, og tí var vónbrotið øgiligt, tá tað ikki eydnaðist. Í ár gjørdist tað jú so, at silvurið var tað, sum vit kundu røkka, og tað var deiligt, at tað eydnaðist, sigur Egil á Bø, liðskipari hjá EB/Streymi.

- Og vit halda okkum eisini kunna vera nøgdar. Við silvurinum her og gulli í steypakappingini er talan um besta árið í felagssøguni. Og tá fær tað illa verið mundandi nógv betri í øllum førum.

Eftir tvey silvurmerki á rað, er væl náttúrligt, at EB/Streymur strembar enn hægri komandi ár. Og hóast hann illa fæst at siga nakað um FM-vónir 12 mánaðir fram í tíðina, so staðfestir Egil, at tað ræður um at halda støðuna millum tey fremstu.

- Her verður onkur útskifting. Ronnie ætlar sær at gevast, og tað ger Símun Eliasen helst eisini. Hartil fer John Heri til Danmarkar, eins og Rafal helst ikki verður við komandi ár, so har skulu spælarar inn á ávís pláss. Men bulurin á liðnum er framvegis á leið tann sami, og sum eg havi skilt tað, so meddar leiðslan eftir, at liðið aftur í 2008 skal halda seg uppi millum tey fýra fremstu. Og ert tú fyrst har, so kann jú alt henda, sigur Egil.

### Vildu vinna

Dysturin á Sandi var annars ikki heilt so misjavnur, sum úrslitið kundi bent á. Fyri tað nógva var B71 heilt væl við, men teir megnaðu sjáldan at vera eins avgjørdir, sum gestirnir vóru tað, og hetta kostaði nógv.

Arnbjørn Hansen legði fyri, tá hann enn einaferð prógvaði seg sum helst vandamesta harran í Formula-deildini, áðrenn Egil á Bø stutt fyri hálvleik økti til 2-0. Eftir steðgin gjørdi Sorin Anghel sítt 10. mál hetta kappingarárið, áðrenn Egil aftur økti.

Seinasta málið í Traðardali í ár fekk B71 tó, tá Magnus Olsen sendi í kassan, men í samlaðu myndini munaði hetta lítið. Og so máttu FSF-umboðini ásanna, at tey høvdu valt skeivt, tá lótu silvurið vera eftir í Havn og tóku bronsuna við til Sands.

## Útlendingarnir gevast

VB/Sumba og Royn hava hildið á við samráðingum um at samstarva, sjálvt um TB takkaði nei í fyrstu atløgu. Bogi Mortensen, nevndarlimur í starvsnevnd, fíggjarnevnd og samstundis samskipanarleiðari, væntar, at greiða fæst á málinum komandi tvær vikurnar. Bogi sigur eisini at útlendingarnar í felagnum fara allir heim eftir kappingarlok, og ógreitt er, hvør leistur verður nýttur til at byggja nóg sterkt lið, so teir megna uppflyting aftur til bestu deildina.

- Ogor fara at tosa við málmannin Vlada Filipovic um leingjan av sáttmálanum og annars fer tíðin at vísa, hvat gjørt verður. Fyrst og fremst verður bíðað eftir hvat kemur burtur úr samráðingunum við Royn, og so verður avgjørt hvat gerast skal, sigur Bogi Mortensen, og leggur afturat, at skilabest hevði verið, at havt eina stammu á liðnum, ið var úr oynni, og at man fekk tað upp at koyra, áðrenn man hugsar um styrk uttanífrá.-

**niels**

VB/Sumba-GÍ 2-4 (2-0):

# Tvey reyð kort og tvey sjálvmál

*VB/Sumba*

*GÍ*

**Hóast VB/Sumba var á odda við tveimum málum í hálvleikinum, so megnaði GÍ at fara um fjørðin við øllum stigunum**

VB/SUMBA-GÍ
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Eftir langan aldudal kom GÍ fyri seg aftur. Í tveimum teimum seinastu umførunum hava teir skorað nìggju og latið tvey fara inn. Í Vági var heimaliðið á odda bæði 1-0 og 2-0, men tá ið síðsta bríksliðið rungaði, var GÍ omaná. Bæði í málum og í manntali. Dimitri Jankovic og Birgir Jørgensen hjá VB/Sumba sóu báðir reytt frá dómaranum, Lars Müller.

Talan var um uppgerð millum eitt lið á veg niðureftir, og eitt lið á veg uppeftir.

Vágbingar hava ein heldur tunnan hóp. Rutineraðu leikararnar eru fáir, og fækkaðu uppaftur meiri, tá ið teir tíðliga vórðu noyddir at síggja miðverjan Dimitri Jankovic verða riknan av vølli fyri at hava stútað ein gøtumann í andlitið. Saknur var í leikbanni Aco Pandurovic og unga Martini Tausen, men VB/Sumba dugdi væl við bóltinum, hóast vindurin var nógvur og darvaði almikið.

### Avgerandi løtan

VB/Sumba dugdu væl at gagnnýta vindin til egnan fyrimun, og løgdu seg á odda beinanvegin. Rutineraði miðvallarin í Djurhuus skoraði, og løtu seinni skoraði verjuskansin Dimitri Jankovic til 2-0 til heimaliðið.

Beint fyri hálvleik hendi so tað, sum ikki skal henda. Dimitri var í hornatøkum við gøtumann, og tá orrustan var av, stóðu Dimitri og ein gøtumaður, høvur móti høvur. Um Dimitri hevur framt brot ella ikki, skal vera ósagt, men hvussu er og ikki, gøtumaðurin fall til jarða og eymkaði seg, og dómarin gav Dimitri reytt. Suðuroyingarnir megnaðu at halda búrið reint intil hálvleik, men tað skuldi verða ørðvísi í øðrum hálvleiki.

Stutt inn í annan hálvleik var Suni úr Hørg so óheppin at beina bóltin í egið mál, og tá so annar hálvleikur var gott og væl hálvrunnin, fekk GÍ heldur ivasamt brotsspark og VB/Sumba, ein afturat riknan av vølli. Hesu ferðina var tað áleyparin Birgir Jørgensen, ið hevði hug at greiða dómaranum frá um sína áskoðan, um hendingina.

GÍ skoraði uppá brotssparkið, og stutta løtu seinni var aftur galið hjá suðuroyingunum. Dan Djurhuus var so óheppin at seta krúllin undir bóltin, so at hann feyk millum vinir og fíggindar í handasta horn í egnum máli, og við bert níggju monnum móti ellivu varð heldur torført at standa ímóti vindinum og einum áhaldandi GÍ pressi. Seinasta málið í dystinum átti málrevurin Christian Lundberg, ið stútaði innlegg úr høgru í netið. Sagt verður úr Vági, at hetta mál var sera vakurt.